# UPPGÁVA 2A

## Ungfólk í álvarsamari ferðsluvanlukku

Tit skulu gera eina søgu um vanlukkuna

- Byrjið við at lesa greinastubban um vanlukkuna
- Persónarnir í vanlukkuni eru persónarnir, sum tit hava gjørt
- Tit skulu greiða frá, hví kvøldið hjá teimum endaði soleiðis

**Søgan, sum tit gera, skal svara hesum spurningum:**

- Hví fóru tey at koyra bil?
- Hvør av teimum kendi tann, sum koyrdi?
- Hvør var fyri vanlukku?
- Hvør sat hvar í bilinum?
- Vóru tey í trygdarbelti?
- Høvdu tey drukkið?
- Var bilførarin ávirkaður?

Søgan skal passa til teir fýra persónarnar, sum tit hava gjørt.

### Ungfólk í álvarsligari ferðsluvanlukku

Um tveytíðina fríggjanáttina fingu tvey 16 ára gomul álvarsligan skaða í eini ferðsluvanlukku, tá ið bilurin, tey sótu í, rendi út av vegnum. 18 ára gamli bilførarin misti eftir øllum at døma tamarhaldið á bilinum í einum krøppum svingi.

Tey 16 ára gomlu á baksetrinum fingu mein. Annað teirra varð slongt gjøgnum forrútin og 20 metrar útum. Hin varð slongdur runt inni í bilinum. Bæði eru innløgd á Landssjúkrahúsið, annað við álvarsligum broti í rygginum og hin við skallabroti.

Hini ferðafólkini í bilinum sluppu frá vanlukkuni uttan álvarslig mein. Bilførarin slapp frá vanlukkuni við smásnuddum, tá hann var íbundin trygdarbelti og stoytkoddin (airbag) virkaði eftir vild.

Løgreglan kannar í løtuni, um talan er um rúsdrekkakoyring.

Tann 18 ára gamli drongurin hevði fingið koyrikortið fyri stuttum.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD
Tilfar brúkt við loyvi frá:
RÅDET FOR SIKKER TRAFIK